


# Fíggjarlig ódn rakar danir

Danir verða nú ávaraðir ímóti bert at halda at landsins fíggjarlóg fer at merkja til versnaðu tíðirnar. Hvør einstakur dani fer heilt víst eisini at merkja avleiðingarnar av hesum. Ein harður steðgur er byrjaður og gerst sterkari næsta ár, skrivar epn.dk. Hevur onkur áhuga í at selja bústaðin, má viðkomandi síggja í eyguni at prísirnir fær at lække nógv. Sambært eini nýggjari forsøgn hjá Handelsbanken fara prísirnir at lækka millum 5 og 10 prosent í ár og komandi ár, tí talið á seljarum er størri enn talið á keyparum.

# endamál



Skeiðsdepilin verður góðar 4000 fermetrar til støddar





Borgarstjórin á Sandi, Páll á Reynatúgvu skoðar tekningarnar av verkætlanini

staklingar og familjur við børnum fara at leita sær higar til Skálavíkar at vinna sær vitan, uppliving, stuttleika, sálarmátt og heilsubót, sigur ein bjartskygdur borgarstjóri í Skálavík.

Við tí upprunaliga lendinum frá kommununi, og tí sum Eiler hevur keypt aftrat, er talan um eitt 50.000 fermetrar stórt øki.

Møguleiki er eisini at royna eina sameining av ymiskum orkukeldum, millum annað reinari orku við vind og sól, ymiskum hitaskipanum við luft og jørð til innihita, umframt elmegi saman við vanligum kolvetni til at hita og reka depilin.

## Útlendingar og føroyingar

Linjohn Christiansen vísir á, at í dag eru fáir ráðstevnudeplar her á landi, um ein sær burtur frá Norðurlandahúsinum og teimum størru hotellunum.

- Hetta hevur mangan verið ein bági og forðan fyri at vit kunnu hýsa størri altjóða ráðstevnum.

- Men henda verkætlanin bøtir munandi um henda tørvin. Og tí vóna vita, at bæði føroysk og útlendsk ferðalið og áhugabólkar fara at leita higar at halda skeið og størri ráðstevnur, sigur hann.

Fyri Linjohn Christiansen hevur tað stóran týdning, at vit eiga ágrýtin fólk, sum haraftrat hava tey góðu hugskotini, tora at váða nakað og haraftrat eru rummisk – tað er: stórtøkin og gávumild.

- Ja, Eiler er ein teirra, ið ikki goymdi gullið, eins og Frænir á Glitraheiði. Men hann ynskir at lata sín pening arbeiða og koma hundraðtals øðrum fólkum og til nyttu og gleði, vísir hann á.



Skeiðsdepilin fer at skapa lív í bygdina og oynna, bæði hjá børnum, ungum og tilkomnum